## DAGSINS MEINING

# Norðuratlantsvindar

Tað kann fyri onkran tykjast sum um, at allir grønlendingar og allir føroyingar arbeiða saman móti einum felags máli, sum er fullveldi. Soleiðis sum ávísir politikarar bera hetta málið fram í eitt nú miðlunum. Vit frætta eisini frá sjálvstýrisráðstevnuni í Grønlandi, sum um, at hetta er í tráð við føroysku fullveldisætlaninar. Er hetta so?

Sjálvstýriskommissiónin, ið varð niðursett í Grønlandi, hevði til endamáls at kanna sjálvstýri innan fyri ríkisfelagsskapin. Hetta er ikki komið so týðiliga fram í føroyska kjakinum, sum tað kanska kundi komið. Hví hetta generelt er so, skulu vit ikki siga, men kunningin frá Norðuratlantsbólkinum hevur so ikki lagt dent á hetta.

Tað er eingin loyna, at Grønland og Føroyar hava nógv til felags við bæði at verð a undir einari heimastýrisskipan, men Grønland skal víðka nógv um sitt sjálvstýri, áðrenn teir koma líka langt sum føroyingar, og tí skal man verða varin við at draga beinleiðis paralellar. Vit kunnu nevna støddina á blokkstuðlinum og støðuna hjá grønlendska málinum.

Grønlandsposten skrivar í oddagrein tann 21. oktober um væntandi mandatið hjá teimum, ið ynskja grønlandskt fullveldi. Eins og í Føroyum, so tykist eingin meiriluti verða fyri loysing í Grønlandi. Hans Enoksen, landsstýrisformaður og partamaður hjá Lars Emil Johansen, ið situr í Norðuratlantsbólkinum, hevur gjørt tað púra greitt, at tað grønlendingar tosa um er øktan sjálvsavgerðarrætt, og ikki fullveldi.

Grønlandsposten nevnir í áðurnevndu oddagrein tað prinsipiella í, at eitt ynski um Grønlendskt fullveldi, eigur at koma frá landstýrinum vegna landstingið, og ikki frá fólkatingslimum, ið eru valdir at taka sær av grønlendskum áhugamálum í danskari lóggávu.

Tað er áhugavert at fylgja kjakinum í Grønlandi. Viðvíkjandi mandati, so eiga vit eisini í Føroyum at ansa eftir, at okkara fólkavaldu umboð á danatingi ikki láta sum um, at tey umboða alt Føroya fólk, tá tey borreiða við orðum sum imperialistiskt eitur ístaðin fyri blokkstuðuli o.s.fr.

Mandat er eitt sera týdningarmikið orð í hesum sambandi. Ein fólkaatkvøða kundi givið eitt loysingarmandat, men hendan bleiv, sum vit øll minnast, avlýst.

Tað er eingin ivi um, at føroyingar vilja økt sjálvstýri. Sjálvt Sambandsflokkurin vil nýskipan. Øll vilja sama veg, men munurin er bara hvussu skjótt og hvussu langt. Vónandi eru vit nú komin forbí tað støðið, har einkultir flokkar látast sum um, at teir einsamallir umboða føroyska fólkaviljan. Lat okkum nú semjast um vegin, og byrja at ganga. So kunnu flokkar steðga, tá teirra mark er rokkið. Alt ella einki hugburðurin hjá samgongu røkkur ongan veg – tað gongur sjón fyri søgn.

**Sosialurin**

# Alla halganna dagur

## Livandi vónin

»Eg eri uppreisnin og lívið; tann, sum trýr á meg, skal liva, um hann so doyr; og hvør tann, sum livir og trýr á meg, skal aldri um ævir doyggja; trýrt tú hesum?« Jóhs. 11,23–26.

1. november, Alla halganna dag, verða vit mint á deyðan og tær álvarsligu avleiðingar, deyðin hevur á tilveru okkara her í lívinum; deyðin er ein náttúrligur partur av lívi okkara, vit verða fødd inn í henda heim, og vit skulu eisini út úr hesum heimi, við tað at deyðin tekur okkum út úr heiminum.

Tá ið deyðin stígur inn um gáttina í heimum okkara, er tað líkasum at alt steðgar upp í tilveru okkara, vit skilja einki av tí, sum hendir okkum í tí løtu; tá er tað gott at hoyra slík orð sum oman fyri standandi, tað er Jesus sjálvur, ið sigur tey við Martu í sambandi við at bróðir hennara Lázarus er deyður; eisini tær báðar systrarnar Marta og Maria vóru ørkymlaðar av tí, sum hent var, at bróðir teirra var deyður.

Soleiðis er tað eisini við okkum, tá ið deyðin vitjar okkara umhvørvi. Vit standa bara spyrjandi, hví skuldi tað nú raka okkum; vit fáa einki svar upp á okkara óteljandi spurningar í slíkum førum, tó er tað ein, sum veit alt um okkara viðurskifti í lívinum, tað er hann, ið hevur allar træðrir í sín hond; Gud tann altvaldandi á Himni, hann veit okkara dagatal, so sum skrivað stendur: Forløg míni eygu tíni sóu, og í tína bók vórðu skrivaðir allir teir dagar, ið avmáldir vóru, áður enn nakar av teimum var til. Sálm. 139,16.

Tí er tað altumráðandi, at vit eru ferðabúgvin, tá boð verða eftir okkum, annaðhvørt tað so er í yngri ella eldri árum; tá ið vit fara higani av foldum, fara vit inn í ævinleikan; meðan vit eru her, eru vit í náðitíðini, náðitíðin er givin okkum, fyri at vit ikki skulu glatast, men at vit skulu eiga eitt ævigt lív heima í Himli saman við frelsara okkara, og sostatt koma vit at møta okkara kæru aftur, um vit eiga Jesus sum frelsara okkara her í lívinum.

Tí at so elskaði Gud heimin, at hann gav son sín, hin einborna, til tess at ein og hvør, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív. Tí at ikki sendi Gud sonin í heimin, til tess at hann skal døma heimin, men til tess at heimurin skal verða frelstur við honum. Jóhs. 3,16–17.

Elskaðu tit, sum nú sita vit stórari sorg í hjarta tykkara, lat hetta verða tykkara troyst, at Gud hevur sent son sín í heimin, til tess at vit ikki skulu glatast, men hava ævigt lív í honum; og eitt skulu tit vita, at tað eru mong Guds børn í landi okkara, sum eru í bøn fyri tykkum, sum mist hava, tað er tann einasti vegurin, vit hava at ganga, bønarinnar vegur, hann kennir øll forløg okkara, hann, sum hevur allar træðrir í sínari hond sum áður sagt, og kennir ta støðu, ið tit eru í, sum mist hava, og sum nú sita við djúpari sorg og sakni. Góðu tit! Jesus troysti og styrki tykkum í sorgini og sakninum í døgunum, sum liggja fyri framman. Skrivað stendur: Eftir hetta sá eg, og sí, stórur skari, sum eingin var førur at telja, av øllum fólkasløgum og ættum og tjóðum og tungumálum; teir stóðu frammi fyri hásætinum og frammi fyri lambinum, skrýddir í longum, hvítum klæðum, og høvdu pálmagreinar í hondunum; og teir rópaðu við harðari reyst og søgdu: »Frelsan hoyrir Gudi várum til, sum í hásætinum situr, og lambinum«. Og allir einglarnir stóðu rundan um hásætið og hinar elstu og hinar fýra verurnar, og teir fullu niður fyri hásætinum á andlit síni og tilbóðu Gud og søgdu: »Amen! Signingin og dýrdin og vísdómurin og takkargerðin og heiðurin og mátturin og kraftin veri Gudi várum um aldur og allar ævir! Amen«. Og ein av hinum elstu tók til orða og segði við meg: »Hesir, sum skrýddir eru í teimum longu, hvítu klæðunum, hvørjir eru teir, og hvaðan eru teir komnir?« Og eg segði við hann: »Harri mín, tú veitst tað«. Og hann segði við meg: »Hetta eru teir, sum komnir eru úr trongdini miklu, og hava tvigið klæði síni og gjørt tey hvít í blóði lambsins. Tess vegna eru teir frammi fyri hásæti Guds og tæna honum dag og nátt í templi hansara; og tann, sum í hásætinum situr, skal tjaldra yvir teir. Ikki skulu teir longur hungra, og ikki skulu teir heldur longur tysta, og ikki skal heldur sól brenna teir, ikki heldur nakar hiti; tí at lambið, sum er fyri miðjum hásætinum, skal røkta teir og leiða teir til lívsins vatnkeldur, og Gud skal turka hvørt tár av eygum teirra«. Op. 7,9–17.

Síðani vil eg enda við einum Alla halganna sálmi, sum eg havi yrkt til Alla halganna dag 2003. Guds friður veri við minninum um tey, sum farin eru, Guds friður veri við okkum øllum í Jesu navni.

## Alla halganna sálmur

*Lag: Mær man leingjast heim til himmalstrendur. Hj. 317.*

*Á Himni stórur hvítur skari stendur,*
*klæddur er í lambsins brúðarlín,*
*tí tey góvu seg í Harrans hendur;*
*Jesus frelsti, tók tey heim til sín.*

*Har tey prísa lambinum sum loysti,*
*tey frá synd og skuld við sínum blóð;*
*undurfullan kærleika hann oysti,*
*tá hann tváaði tey hvít sum snjó.*

*Tey her hvíldu hvønn dag í hans náði,*
*lívið teirra var í hansar' hond;*
*hann sum hevði alt í sínum ráði,*
*bjargaði teim heim í lívsins lond.*

*Stórur er tann frelsti hvíti skari,*
*við Guds trónu, pálmagrein í hond;*
*Jesus sjálvur førdi lítla farið,*
*so tað náddi Himna sælu strond.*

*Vitnisburður teirra ikki tagnar,*
*um tey eru okkum farin frá;*
*øll tey góðu minnir okkum gagnar,*
*Jesus er teim sjálvur altíð hjá.*

*Um enn vit við sorg og sakni mega,*
*liva lívið hesum foldum á;*
*Gud alvaldi kennir sáran trega,*
*vit frá honum troyst og ugga fá.*

**Kjartan Stakksund**


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Frá Fullveldi til bommveldi

**Virgar T. Dalsgaard**

Her í heystfrítíðini høvdu vit útisetar høvi til at hitta mangan høvuðrystandi heimaføroyingin, sum var í Danmark og ferðaðist. Sum onkur helt fyri – vit koma niður at anda! Persónligur fundur er altíð sera hugalig variatión frá tí møðisligu og heldur ikki bíligu telefonini. Tað, sum gongur aftur í orðalagnum hjá flestu heimafólkum, eg havi prátað við, er, at tey næstan uttan undantak eru deyðiliga leidd og hjartaliga troytt av tí framhaldandi ósømiliga politiska sjónleikinum í landsstýrinum, eitt nú politiska kabarettmanningin leggur frá sær. Lagt kann vera afturat, at tað avgjørt ikki bara eru andstøðufólk, eg havi skift orð við!

Sosiala niðurpíningin er ógvuliga týðulig nú – sama er við fíggjarliga likviditetinum, hóast henda samgonga hevur etið upp hálvaaðru milliard, sum teir fingu til gávis frá dønum í sambandi við eina sonevnda bankakreppu. Umsiting og viðlíkahald av landsins framleiðsluamboðum, skipum og bygningum er ein katastrofa. Um ikki olju- og bensingjaldið, hevði verið so nógv fallið, tí amerikanski dollarin til alla lukku er munandi viknaður, hevði veturin blivið strævin og bítandi kaldur at syfta hjá vanligum lønmóttakarum.

Hóast flestøll eru greið yvir, at tað fíggjarliga skvampar og brýtur í bæði borð nú, tá ið fyrst danski blokkurin er skerdur, høvuðsvinnan er í neyðstøðu, útflutningurin minkar og sosialt omanlop hóttir tey ringast staddu, ja, so sita teir ábyrgdarleysu tinganeslókarnir sum kátir smádreingir og spæla sær við dýrum yvirtøkum, leita eftir nýggjum trætumálum við Danmark um onkur hálvfjákut mikroskopisk formalia ella fuska við órealistiskum spøkilsisprojektum, sum ikki sakliga kunnu fíggjast. Hetta er sum at *spæla violin, meðan Rómaborg brennir í øsku,* eins og keisarin Nero gjørdi á sinni.

VaraHoydal *vil* ella *torir*, sum ein annar Per Gynt, *ikki* at síggja sosiala og fíggjarliga veruleikan rundan um seg og flýggjar tí inn í okkurt óviðkomandi og líkasælt sandkassamál – beint nú krokar hann saman við *inhabila* pápa sínum, tí *spaklyntu brævrøddini úr London* aftanfyri eina óhugnaliga tjóðveldis*jura*, har feðgarnir skiftast um at byggja ógvisligar hvørviborgir, sum næstan gevur nógvum veljarum totaliterar associatiónir um ein komandi føroyskan politistat.

Tann lítillætni sosialrealistiski filosoffurin, Páll á Reynatúgvu hevur í síni stuttu embætistíð sum ein barbariskur ríðifúti næstan fingið sorlað tað sindrið, sum var eftir av sosialari vælferð í stórum parti av landinum, burtursæð frá sínum egna valdømi.

Serliga barokk er tann kosmetiska fíggjarætlanin, sum fyri tað mesta er órealistiskir ynskitankar. Eingin, heldur ikki fíggjarministarin, Karstin Hansen sjálvur trýr upp á hansara bjartskygdu fíggjarlóg. Hann sigst ikki at hava tikið so frægt sum komandi játtaðar lønarhækkingar við í sínum metingum, so ætlanin er púra fiktiv og kann bara greiðast við kontinuerligum stuðuli frá ørgrynni av eykajáttanum.

Fyri at seta trumf á, vágar finansráðharrin sær saman við tí servila landsbankastjóranum at siga upp danska fíggjareftirlitið, sum annars kundi hildið hesum ævintýrarum eitt sindur í velið. Hetta er ikki bara nasadjarvt, men ótrúliga ábyrgdarleyst – púra ófatuligt er, at andstøðuflokkarnir ella danska stjórnin lata slíkt um seg ganga. Tað sær út, sum um danir heilt hava uppgivið at tosa fornuft við tað núverandi landsstýrið og bara lata teir sigla sín egna sjógv sum óflýggjaligir óvitar. Er tað nakrantíð, at vit hava havt brúk fyri kønum og hvøssum donskum fíggjareftirliti, so er tað *júst* NÚ!

Landsbankastjórin hevði fingið nakað av virðing aftur millum manna, um hann tordi at átala fíggjarliga ørskapinum hjá núverandi stýri, men fyribils hevur hann valt at ýla við teimum úlvum, hann ferðast ímillum. Men tigur hann, inntil skrædlið kemur, fær hann sín part av ábyrgdini. Tí átti hann, um hann skal varðveita nakað fíggjarligt trúvirði, sum skjótast at *mynstra av* tí kollsiglandi landsstýrisskútuni.

### Føroyski veljarin verður hildin fyri spott

Men astronomiska metið í frekleika setti tó danski fólkatingslimurin, Tórbjørn Jacobsen, tá ið hann, sum hevur ýlt, skríggjað, ja, beinleiðis níst um fullveldi og føroyskt sjálvbjargni, eyðmýkti seg og fór luskandi á knøunum til *donsku* stjórnina og *biddaði* um at fáa danska statslánið, sum bjargaði Føroyum á sinni niður á 0% í rentu, har føroyingar frammanundan hava sera góðar treytir við elalítlum avdrátti. Hetta er so ósmæðin snultan, so stór skomm og so mannminkandi olmussubiddan fyri tjóðveldisflokkin, at tað er einki at undrast á, at fleiri síðani hava nevnt hann *landsbiddaran*, sum fer burtur í lond at snulta. At harra T. Jacobsen, MF av øllum skal troysta sær at fara hesa trælakendu skammarferð til danir, teir danir, sum hann annars næstan hvørja viku harðmælt og systematiskt spillir út!

Ikki so frægt *fult veldi* hevði hann á sær sjálvum, at hann fataði, hvussu neyðarslig og hvussu hjálparleys henda ónossliga biddaraferðin var.

Hetta er sanniliga raskur maður, hann fer grátandi til danir, tá ið sansar at egnum trotabúgvi og bønar um hjálp! Slíkt er suverenitetur! Vorðið sum sjálvbjargni! Hvat munnu danir, sum hann hunddálkar í fólkatinginum, halda um sovornan atburð.

Men hetta er ikki einasta hjálpin, hesin fantastur hevur biðið um, nei, hann plagar eisini at leita sær grønlendkska hjálp! Og tað er av hansara ávum, at tveir grønlendskir politikarar eru farnir at leggja seg út í føroyskan heimapolitikk. Hvat billa teir sær inn? Hvar er teirra føroyska mandat? Hvat hevði fólkatingsTórbjørn hildið um, at føroyskir andstøðumenn løgdu seg út í grønlendsk heimapolitisk mál? Annars eru tjóðveldismenn hysteriskt erkvisnir, sjálvt tá ið ein dani sera varisliga kemur við onkrari lítlari viðmerking um føroyskt viðurskifti.

Men fortíðin spøkir! Í tredivunum fór Jóannes Patursson ofta til Noregs eftir »hjálp« og hann fekk ultra-reaktionerar norðmenn at leggja seg beinleiðis út í føroyskan heimapolitikk. Tað var, eisini av egnu partamonnum hansara, hildið at vera sera óklæðiligt. Serliga áhugavert er at festa seg við, hvørjar menn Jóannes Patursson so ofta ráðførdi seg við í Noreg – tað vóru t.d. menn á chauvinistiska málgagninum, *Tidens Tegn* – flestu lesarar vita allarhelst, hvar tað høgrablaðið stóð, og hvar menninir á tí blaðnum stóðu politiskt.

Annars var, sum ofta fyrr nevnt, ein norskur docentur javnan og vitjaði feðgarnar Patursson undan krígnum. Docenturin, sum var kendur danahatari, skuldi leggja feðgunum lag á, hvussu teir skuldu fáa loysing frá Danmark. Hetta var eisini, eins og við grønlendingunum hjá Tórbirni vamlislig uppílegging í føroyskan politikk. Men líka so nógv teir harðmæltu Paturssonmenninir reypaðu av norska docentinum áðrenn kríggið, líka so steintigandi vóru teir um norska vinmannin eftir kríggið, tí ólukkutíð – loysingardocenturin var ein av teimum allarfyrstu norðmonnum, sum varð dømdur fyri nazistiskt landasvik í 1945 á Ákershús festningi uttan fyri Oslo. Tað er altíð bæði ómansligt og ússaligt at fara út í onnur lond at fáa sær hjálp móti dønum ella egnum landsmonnum.

### Køld og beisk tíð fyri framman

Tað er framvegis ótrúligt, at kyniskir tjóðveldismenn undirvurdera føroyska veljaran so grovt, at teir halda, at tað ber til at krógva fyri fólki, at landið stýrir stavnbeint móti álvarsomum fíggjarligum og socialum ragnaroki við at kyrra fólk við nationalum rakstrarrópum og við at brandskatta smábørn og diabetikarar við primitivum bommtolli. Men tað er fyri fólkaheilsuna skyld prædikar finansgeniið, Karstin Hansen.

Veljarar heima, eins og her eru ikki bara ovfarnir, men beinleiðis forargaðir um, hvussu apatiskir og steintigandi fjølmiðlarnir eru um ábyrgdarloysi, ódugnaskapin, hjálparloysið og tað vitleysa politiska cirkus, sum bæði varaløgmaður, socialministarin, pengaministarin *(tað er hann við bommunum)* og fólkatingsumboðið skipa fyri. Hví eru journalistar okkara so landsstýrislýdnir – eru teir ræddir ella eru teir bara ódugnaligir? Hvar er *hitt fjórða valdið,* sum skal avdúka teir populistisku makthavararnar? Tað hevur undrað mangan eygleiðara, at so leingi Edmundur Joensen var løgmaður, troðkaðust goyggjandi miðlamenn á Tinganestrappuni við mikrofonini niðri í hálsinum á Edmundi, so hann illa slapp til døgurða fyri teimum, sum teir inkvisitoriskt forhoyrdu og tráspurdu hann um næstan alt, og hann skuldi svara beinanvegin.

Men so skjótt sum fullveldisgongan kom út í landsstýrið hevur verið annað lagið! Tá vórðu landsstýrismenninir knappliga púra friðaðir og settu sjálvir dagsskránna um nær og hvussu, teir vildu spyrjast, og Tinganestúnið gjørdist at kalla eiðasørt fyri forvitin miðlafólk! Blaðmenninir eftirlíkaðu teimum sum lýdnir hundar. Í dag sæst ikki blaðmaður í Tinganesi av sínum eintingum. Naskir spurningar verða ikki stillaðir!

Tað eru sjálvsagt ljósár millum ódámliga revolvarajournalistikkin í Edmundar tíð, og so tann undirbrotliga trælasiðin, sum nú ræður millum føroyskar blaðmenn, ið skulu vera kritiska vaktarliðið yvirfyri makt- og stýrismonnum. Men søgan fer einaferð at fella ein harðan dóm yvir teir feiku og talentleysu føroysku journalistar, sum ikki hava *civile courage* og lutvíst hava skyldina av, at henda landsstýrisgonga higartil hevur fingið so lætt spæl, og fyrst nú verður spakuliga avdúkað. Einki varar, heldur ikki ein tyrannisk politisk samgonga. Journalistar kunnu í tólvta tíma fáa nakað av sínum søguliga trúvirði aftur, men tað hastar hjá teimum!

Kanska eru miðlamenn so helslignir av føroyska gerandisveruleikanum, at teir hvørki vita út ella inn – eru teir miðskeiðis í eini fjákutari komediu, ella eru teir vitni til eina ræðuliga tragediu? Ja, valið er teirra, men landspolitikkur *kann* kortini *ikki* loypast um! Teir áttu at stúrsa líka so nógv sum vanligi veljarin um, at tað breggjandi fullveldi er reducerað til fjaðursárt klynkandi bommveldi.

Tað er paradoksalt, men meðan *fullveldið* í síni tíð varð lýst sum eitt problemfrítt túsundársríki við suksursøtum, næstan ævigum sunnudags-romantikki, verður tilstundandi *bommveldið* ikki lýst sum einans søtur idyllur – og *hesu ferð* lýgur landsstýrið tíanverri ikki – tvørturímóti, nú stundar móti køldum, svangligum og súrum gerandisdegi.

Men bjartskygd fólk kunnu kortini ugga seg við, at alt hevur sína tíð og várið kemur aftur, sjálvt eftir beiskan vetur, sum tikið verður til í niðurlagnum á gamla týska schlagaranum:

Es geht alles vorüber
es geht alles vorbei.
Auf jeden dezember
volgt *wieder* ein Mai.


Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!


## Ósemjan

Spælir bólkurin, Ósemjan, eisini væl í Íslandi, Elis?

**Sjúrður Hansen, Gøta**